Bill og Jenis mugu steðgast

– Vil miðflokkurin ikki sleppa sínum víðgongda politikki á átrúnaðarliga á økinum, eigur hann at verða varpaður úr samgonguni, heldur Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður

SAMGONGUSTEV
Áki Bertholdsen

Bill Justinussen og miðflokkurin eiga at fáa eina harðliga átalu og heldur hetta fram, eiga teir at verða varpaðir úr samgonguni, heldur Tórbjørn Jacobsen.

– Miðflokkurin eigur nú at fáa eina harðaliga átalu.

Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin, heldur ikki, at samgonguni er lív lagað, broytir miðflokkurin ikki kós.

Torbjørn Jacobasen sigur, at samgongan hevur ikki meiri enn lagt árarnar út, nú miðflokkurin í tveimum førum hevur skapt so álvarsligar trupulleikar at tíðin eigur at vera komin til at steðga á og at hugsa seg um.

– Herfyri var tað spurningurin um fosturtøku, har miðflokkurin skapti ein trupulleika við at kunngera sjónarmið, sum liggja so fjart frá tí, sum tjóðveldisflokkurin stendur fyri, sum hugsast kann. Og nú hevur hann enn einaferð lagt afturat bálinum við eini rættiliga sermerktari samanseting av siðseminevndini.

Tað hevur vakt ans, nú landsstýrismaður miðfloksins, Bill Justinussen hevur valt nýggjar limir í vísindaligu siðseminevndina.

Ikki tað, at nevndin er vald, men tað eru fólkini, hann hevur valt í nevndina, sum hevur ørkymlað mong, tí landsstýrismaðurin hevur valt fólk í nevndina, sum eru kend úr ymsum átrúnaðarligum minnuluta bólkum her á landi.

Í Løgtinginum mikudagin reisti Annita á Fríðriksmørk, tingkona fyri tjóðveldisflokkin málið í tinginum, har hon hvassliga fanst at, at Bill Justinussen hevur valt siðseminevndina soleiðis, at meirilutin av nevndini nú umboðar ein lítlan minniluta í føroyskum trúarlívi.

Og partamaður hennara í tinginum, Torbjørn Jacobsen, er púra samdur.

Hann heldur, at soleiðis, sum miðflokkurin hevur borið seg at í spurninginum um fosturtøku og í málinum um siðseminevndina, er tað við at gerast ein trupulleiki hjá samgonguni. Hann heldur, at miðflokkurin eigur at fáa eina harðliga átalu fyri sítt politiska virksemi higartil.

– Og tekur hann ikki betri partar fyri seg, eigur hann at verða varpaður úr samgonguni.

Tórbjørn Jacobsen leggur dent á, at hann tosar bara fyri seg sjálvan.

– Men tað er greitt, at verður hetta stílurin hjá miðflokkinum framyvur, verður tað ómetaliga tungt hjá mær at samstarva við flokkin.

Misskilt støðuna

Tórbjørn Jacobsen heldur, at Bill Justinussen fullkomiliga hevur misskilt støðuna, tá ið hann velur limir í eina nevnd alt eftir, hvussu samdir teir eru við sjónarmiðini hjá honum sjálvum.

– Nevndir og ráð verða ikki vald fyri at ganga landsstýrismanninum á møti í hansara sjónarmiðjum. Tey vera vald fyri eitt embæti og eina politiska skipan og ikki eftir, hvat tænir tí einstaka landsstýrismanninum best.

Hann sigur, at vit hava ikki tað amerikonsku skipanina í Føroyum, har hvør nýggir forseti skiftir alla umsitingina út, tí har er umsitingin politiskt.

– Í Føroyum er umsitingin faklig og tískil skulu nevndir og ráð veljast eftir fakligum fortreytum og ikki persónligum.

Løgtingsmaðurin sigur, at hann hevur sjálvur reist málið í einum skrivligum fyrispurningi, har hann spyr løgmann, um tað eru saklig og objektivar fortreytir, sum eru galdandi, tá ið nevndir og ráð verða sett og tá ið fólk fáa alment starv.

– Alt annað er púra vitleyst, leggur hann afturat.

– Í hesum føri hevur hann er ein grundgeving fyri at velja eitt umboð í siðseminevndina, at hann hevur havt nakrarsendingsr í útvarpsrásini Lindini. Eg haldi ikki, at tað skulu betri kvalifikatiónir til at manna siðseminevndina enn tað.

Torbjørn Jacobsen vísir á, at siðseminevndin er ein ógvuliga týdningarmikil nevnd, tí hon skal taka støðu til granskingarverkætlanir og hevur tí avgerðandi ávirkan á framtíð Føroya.

– Men hesuferð er tað týðiligt, at hann einans hevur valt limirnar í siðseminevndina úr sínum egna umhvørvi og tí er framferðin hjá Bill Justinussen brandskeiv.

– Hvør í hesum landi skal fáa sær eína útbúgving til nakað sum helst, tá ið tað telur meiri at vera limur í ávísum flokkum ella ávísum trúarbólkum, spyr Tórbjørn Jacobsen at enda.

Væntaði at miðflokkurin fór at skikka sær hampiligt

– Eftir teimum royndum, vit higartil hava, mugu vit ásanna, at frægasta samgongan hevði verið ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin, heldur Tórbjørn Jacobsen

SAMGONGUSTEVN
Áki Bertholdsen

– Eg hevði væntað, at miðflokkurin fór at skikka sær hampiligt, nú kom við í samgonguna.

Politiska framferðin hjá miðflokkinum higartil eru komin eitt sindur óvart á Torbjørn Jacobsen, løgtingsmann tjóðveldisfloksins.

Hann ásannar at at miðflokkurin og tjóðveldisflokkurin hava so ymsa áskoðan á nógv ymisk mál, at teir eru sum eldur og vatn.

Spuringurin er tí, um tað var annað væntandi?

Men úrslitið av løgtingsvalinum 30. apríl varð so løgið, at miðflokkurin endaði í samgongu, tí hann var hóast alt hampiliga sjálvstýrissinnaður.

– Tað tekur oftani nógv ár, áðrenn flokkar, sum eru so lítlir sum miðflokkurin, yvirhøvur koma í samgongu. Tí hevði eg ikki vænta, at hann fór at taka so umstríddar avgerðir, sum hann longu hevur gjørt, fyrst í spurninginum um fosturtøku og nú aftur tá ið landsstýrismaður floksins valdi siðseminevndina.

– Eg hevði væntað, at hann fór at føra ein politikk, har teir vildu vísa, at teir kundu sita í samgongu . Men vit mugu ásanna, at teir hava longu víst, at teir eru ikki búnir at sita í stjórn.

Tórbjørn Jacobsen leggur dent á, at hetta er hansara egna áskoðan og hann heldur ikki, at samgongan eigur at tola fleiri politisk tiltøk av hesum slagnum

Men soleiðis sum hann sær støðuna nú, heldur hann, at frægasta samgongan hevði verið ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin.

–Politisk hevði hetta verið tann frægasta loysnin. Sum tað vísir seg, hevði ein slík samgonga havt hampiliga javnvág, bæði úteftir vinstra og høgra ásinum og uppeftir sjálvstýri og sambandsásinum.

Ikki minst heldur tjóðveldismaðurin úr Eysturoy, at ein slík samgonga er áhugaverd, nú tað vísir seg, at javnaðarflokkurin ikki er so óviljaður at taka undir við einum politikki, sum liggur á sjálvstýriskósini og sum hevði eitt hægri mál á tjóðskaparliga økinum, enn tær gomlu samgongurnar í sjeyti og áttatiárunum ímillum hesar flokkarnar høvdu.

–Sum er, dugi eg ikki at síggja aðrar møguleikar, sigur hann, ikki minst nú tað eisini vísir seg, hvussu sambandssinnaður einsamalli tingmaðurin hjá sjálvstýrisflokkinum eisini er.

– Skulu vit hava ein nøkunlunda skilagóðan, framrættaðan og siviliseraðan politikk, kann væl henda, at hetta hevði verið frægasta loysnin.

Men um hetta skal henda beint nú, veit hann ikki.

–Tað er onki at ivast í, at Bill Justinussen hevur gjørt sjálvmál í spurninginum um siðseminevndina. Men blívur hetta við, fái eg ógvuliga ringt at liva við tí, sigur Torbjørn Jacobsen.

Bill fylgdi ikki innstilling frá umsitingini

Umsitingin í trivnaðarmálaráðnum mælti Bill Justinussen til at velja somu limirnar aftur í siðseminevndina, men hann vildi ikki fylgja tilmælinum og valdi nýggjar limir í teir flestu sessirnar

SIÐSEMINEVNDIN
Áki Bertholdsen

– Eg valdi nýggjar limir í nevndina fyri at tryggja at ikki øll nevndin verður skift út ísenn, sigur Bill Justinussen

Tá ið Bill Justinussen valdi nýggjar limir í vísindaligu siðseminevndina, gekk hann ímóti tilmælinum frá síni egnu umsiting.

Umsitingin hevði nevnilga mælt landsstýrismannninum til at velja alla nevndina aftur.

Hetta váttar Helle Rosenvold Anderson, sum er løgfroðingur í trivnaðarmálaráðnum.

Annars er tað læknafelagið, sum velur tríggjar limir í siðseminevndina, men landsstýrismaðurin veldur hinar fýra

Í Sosialinum týsdagin, fyrr í vikuni, segði Bill Justinussen, at tá ið hann skuldi velja sínar fýra limir í seiðseminevndina, var tað ikki eftir aftur einum fakligum tilmæli frá umsitingini.

– Hetta skal skiljast so, at umsitingin setti ikki nøvn á sum so, men mælti til at velja somu nevndin aftur, sigur hann og váttar annars, at hann fekk eitt tilmæli.

Vit spurdu eisini Helle Rosenvold Andersen um umsitingin royndi at fáa landsstýrismannin at broyta støðu, tá ið tað gjørdust greitt, at hann ikki ætlaði at fylgja tilmælinum frá umsitingini.

Hon sigur, at tað er avmarkað, hvat hon kann upplýsa, tí talan er um innanýsis skjøl.

– Men tað var ikki trupult at síggja, at hetta kundi elva til trupulleikar, sigur hon.

Bill Justinussen sigur, at valdi nýggjar limir í nevndina fyri at tryggja samanhangin í arbeiðnum, tí tað stendur í lógini, at nevnarlimir kunnu bara endurveljast einaferð.

– Varð nevndin aftur vald nú, skuldi øll nevndin skiftast út næstu ferð.

Annars sigur hann, at umsitingin eisini mælti honum til at broyta reglarnar, so ikki øll nevndin verður skift út um fýra ár fyri at tryggja samanhangin í arbeiðnum, og at og hesum ætlar hann at fylgja.

– Men eg havi onga trygd fyri, at tað eydnast, og tí valdi eg at skifta nevndarlimirnar út fyri at tryggja samanhangin í arbeiðnum. Gjørdi eg ikki tað, er vandi fyri, at allir sjey nevndarlimirnir verða skiftir út í senn.

Eydnast tað hinvegin at broyta reglarnar, verða helst tvey av teimum fólkunum, eg havi valt, skift út um tvey ár.

Í blaðnum í morgin hava vit meiri um siðseminevndina.

EIN DAGUR FYRI VINNUNA

Fyrst fekk Havsbrún heiðurin. Síðan kom Tórshavnar Skipasmiðja. Og nú nærkast, at Ársins virki 2002 verður útnevnt. Tað verður avdúkað á árliga vinnudegnum, sum Vinnuhúsið skipar fyri í Norðurlandahúsinum. Vinnudagin fært tú eisini møguleika at hitta onnur í vinnulívinum. Tú hoyrir undangongufólk greiða frá teirra royndum og visjónum um framtíðina. Umframt Ársins virki verður eisini Ársins átak heiðrað.

Gev boð um luttøku í góðari tíð – helst innan 26. september. Kostnaður fyri tiltakið er 950 kr. við degurða á Hotel Føroyum um kvøldið. Verður meldað til tiltakið seinni enn 26. september, er kostnaðurin 1250 kr.

Vinnudagurin fríggjadagin 4. oktober

VINNUHÚSIÐ
House of Industry
R. C. Effensensgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, Industry@industry.fo

Stuðlað Vinnudegnum hava

ATLANTIC AIRWAYS · FØROYA SPARIKASSI · KAUPTHING · STATOIL · notio · Føroya Kolvetni · Shell

Skrá fyri vinnudagin:

KL. 14.00
Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vilhelm Johannesen bjóðar velkomin

Kl. 14.10
Landsstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm

Kl. 14.25
Vinnusjónarmið 2002 Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum

Kl. 15.05
Vinnan og trúvirði, Johan Schroder, stjóri í Radiometer

Kl. 15.25
Steðgur – Kaffi

Kl. 16.00
Ein lívsvinnutjóð og ES, Árni M. Mathiesen, ísendskur fiskimálaráðherra

Kl.16.30
List og gransking sum íblástur hjá vinnuni, Eydun Andreassen, professari

Kl. 17.00
Steðgur

Kl. 17.20
Heiðursprógv fyri serligt átak

Kl. 17.30
Ársins virki 2002 verður kosið

Kl. 17.50
Liðugt í Norðurlandahúsinum

Kl. 19.30
Gallaðgurði á Hotel Føroyum

Meira um tilmelding og tiltakið er at finna á heimasíðu okkara www.industry.fo